Súni varð bestur

Súni Olsen úr GÍ og Rannvá Andreasen vórðu kosin sum bestu leikarar í júst lidna fótbóltsárinum, tá gallaveitsla varð hildin um vikuskiftið

GALLAVEITSLA
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Sum tað hevur verið siður seinnu árini, so var tað aftur í ár GÍ, sum skipaði fyri gallakvøldinum, og aftur hesaferð var Mentunarhúsið í Fuglafirði karmur um tiltakið.

Umframt at hetta var eitt høvi hjá leikarum, venjarum og leiðarum annars at siga takk fyri lidna fótbóltsárið, so var hetta sjálvsagt eisini staðið, har bestu leikararnir á árinum skuldu kjósast.

Súni bestur

Ikki óvæntað, so varð tað Súni Olsen úr GÍ, sum fekk hendan heiðurin hjá monnunum. Hóast GÍ til tíðir hevur riðið hampuliga lágt í landskappingini, so hava avrikini hjá Súna støðugt verið í topp, og ikki minst hevur hann eisini verið millum teir allarbestu, hvørja ferð landsliðið hevur leikt.

Hjá kvinnunum fall valið aftur í ár á Rannvá Andreasen úr KÍ. Umframt heitið sum ársins leikari, vann hon eisini gylta skógvin frá Thomas Dam ítrótti fyri tey 30 málini, sum hon skeyt í landskappingini. Hjá monnunum var tað Sonni L. Petersen, sum við 13 málum var besti málskjúttin.

Nógv steyp at handa

Tað eru tó eisini onnur steyp, sum verða latin á slíkari gallaveitslu. Á venjarasíðuni fekk Johan Nielsen stórt heraklapp fyri arbeiði sítt á Skála, sum eftir tvey ár í niðurflytingarstríði brádliga var við í gullstríðnum storan part av kappingarárinum. Hjá kvinnunum var tað meistaravenjarin, Jón Harald Poulsen, sum fekk hendan heiðurin.

Ársins málverji í kvinnudeildini varð Randi Wardum úr KÍ, og hjá monnunum fall valið á Bjarna Johansen úr VB, sum aftur í ár hevur verið tryggur aftasti skansi hjá vágbingunum.

Og at enda skuldu ársins stjørnuskot kjósast. Oftani eru tað hesi, sum størsti spenningurin er um. Fleiri vóru eisini, sum fingu atkvøðu, men tá talt varð saman, høvdu Jónhard Frederiksberg úr Skála og Rakul Magnussen úr EB/-Streymi fingið flestu atkvøðurnar.

Súni Olsen hevði eitt sera gott kappingarár persónligt, og hóast tað ikki gav heiðursmerki í landskappingini, so mundi steypið um vikuskiftið vera eitt stórt plástur á sárið
Mynd: Finnur Justinussen

Tey bestu

Hesi vórðu heiðraði á gallakvøldinum leygarkvøldið

Gylti skógvurin frá Thomas Dam Ítrótti - Kvinnur

Halltóra Joensen,	B36	15
Malena Josephsen,	KÍ	26
Rannvá Andreasen,	KÍ	30

Menn

Súni Olsen,	GÍ	12
Rógvi Jacobsen,	HB	12
Sonni L. Petersen,	EB/S	13

Ársins venjari - Kvinnur
(steyp latið av Samkeyp)
Jón Harald Poulsen, KÍ

Menn
John Nielsen, Skála

Ársins málverji - Kvinnur
(steyp latið av Statoil)
Randi Wardum, KÍ

Menn
Bjarni Johansen, VB

Ársins stjørnuskot - Kvinnur
(steyp latið av Tryggingarfelagnum Føroyar)
Rakul Magnussen, EB/Streymur

Menn
Jónhard Frederiksberg, Skála
(steyp latið av Føroya Tele)

Ársins leikari - Kvinnur
Rannvá Andreasen, KÍ
(steyp latið av Skipafelagið Føroyar)

Menn
Súni Olsen, GÍ
(steyp latið av Atlantic Airways)

Fagnaðurin var stórur, tá vinnaranrir av atkvøðugreiðslunum ein og ein vórðu ropt upp
Mynd: Finnur Justinussen

FCK er aftur á null

Tap móti uppflytarunum og Brøndby sigur í toppdysti ber við sær, at FCK longu er átta stig frá oddasessinum, sum teir so fegnir vilja vera við í stríðnum um

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Mynd: Zuma
Einki er at siga til, um teir í FCK hanga eitt sindur við høvdunum í hesum døgum

Vikuskiftið hilnaðist illa hjá FCK. Teir taptu 4-1 í Silkeborg. Harvið hava meistararnir og steypavinnararnir bara fingið eitt stig burturúr útidystunum móti teimum báðum uppflytaraliðunum — Silkeborg og Randers FC.

Eftir rættuliga trilvandi byrjan hevði FCK undan ferðini til Silkeborg vunnið tríggjar ferðir á rað. Tí varð mett, at skútan var komin aftur á røttu kósina. Vónirnar vóru eisini góðar undan uppgerðini, tí Silkeborg hevði tapt seks dystir á rað.

At tað hevur gingið rætta vegin hjá FCK, og at Silkeborg hevur verið illa statt, sást lítið til sunnudagin. Silkeborg vann 4-1, FCK avrikið var ússaligt, og liðformaðurin, Bo Svensson, staðfesti aftaná, at nú eru teir aftur á nullpunktinum. Hesa ferð vóru Zuma og Peter Møller í FCK álopinum. Eftir steðgin varð Álvaro Santos settur á vøllin fyri miðvallaran Michael Silberbauer. Jesper Bech var ikki við, tí hann var skaddur.

Todi Jónsson stríðist framvegis við at koma fyri seg eftir liðbandsskaða í knænum. Nú eru tað knappliga tveir mánaðir síðani, at liðbandið fór. Á heimasíðu síni segði Todi í síðstu viku, at hann verður ikki førur fyri at spæla fyrrenn um mánaðarskiftið. Tí verður tað neyvan ikki nakað serligt, at hann fer at spæla afturat í hesum árinum. Danska fótbóltskappingin fer í vetrarfrí tríggjar vikur undan jólum.

Toppurin

Í hesum vikuskiftinum varð sjøtul settur á annan triðingin av donsku landskappingini. Í fyrsta triðinginum tapti Brøndby bara eina ferð. Tað var í fyrsta umfarinum, tá ið OB vann 2-1 á teimum. Síðani vann ella spældi Brøndby hvørja ferð javnt.

Leygardagin vitjaði OB á Brøndby stadion. Talan var um rættuliga toppuppgerð. Brøndby vann 2-1. Øll málini komu í 2. hálvleiki. Sigursmálið stútaði ungi miðverjin Daniel Agger. Hetta var fyrsta málið hjá honum í Brøndby. Hesin evnaríki, stóri og ungi maðurin kom í besta Brøndby hópin, eftir at Jón Rói Jacobsen í síni tíð hevði strítt seg so langt.

Viborg er rættuliga óvæntað næstfremst. Hesa ferð hevði Viborg, sum var á triðja plássinum, vitjan av FCM, sum frammanundan var á fjórða plássinum. Tað hevur ikki gingið nakað serligt síðstu umførini hjá FCM, og teir taptu enn eina ferð. Hóast toppskjúttin í superliguni Mohammed Zidan javnaði til 1-1, so tykist sjálvsálitið hjá FCM ikki at vera nakað serligt. FCM javnaði, tá ið tað restaðu seks minuttir, men Viborg fekk sigursmálið í síðstu løtu.

AGF var undan vikuskiftinum næstfremst. Hesa ferð høvdu teir í Árhus vitjan av AaB, sum hevði vánaliga byrjan upp á kappingarárið, men sum frammanundan ferðini til jyska høvuðsstaðin hevði fingið fult tríggjar ferðir á rað. Í Árhus var úrslitið 2-2. Á heimaliðnum hildu teir seg hava havt spæl og møguleikar til at fáa øll stigini.

Botnurin

Síðsta kappingarár var Esbjerg leingi fremst. Fyrsti triðingurin í hesum kappingarárinum hevur verið rættuliga trilvandi. At fleiri av mest royndu spælarunum ikki hava verið við, hevur verið mett sum stórur veikleiki. Hesa ferð var Esbjerg í Farum. Tað hevur verið og er nógvur turbolensur í og kring FCN, har venjarin, Christian Andersen, er í brennideplinum. Úrtøkan hjá teimum hevur heldur ikki verið nakað at reypa av, og eftir tólvta umfarið er FCN næstniðast.

Esbjerg vann 3-2, eftir at teir í steðginum høvdu verið á odda 3-0.

Ringast av øllum stendur tað til hjá uppflytarunum úr Randers. Sunnudagin vóru teir í Herfølge, har tað heldur ikki hevur hilnast nakað serligt hjá heimaliðnum. Herfølge legði seg framum 2-0, men Randers javnaði til 2-2, tá ið tað restaði eitt korter. So fekk Herfølge sigursmálið, og tað var ikki so lítið kostiligt. Ein verjuspælari hjá Randers royndi at sparka burtur. Bólturin rakti í beinið á dómaranum og støkk til ein av Herfølge spælarunum, sum skoraði 3-2 sigursmálið!

Danska superligan

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Brøndby (S)	11	7	-	3	-	1	18	7	11	24
2 Viborg	11	6	-	2	-	3	14	10	4	20
3 AGF	11	5	-	3	-	3	19	13	6	18
4 FCM	11	5	-	2	-	4	15	16	-1	17
5 OB	11	5	-	1	-	5	21	17	4	16
6 FCK (M)	11	4	-	4	-	3	18	19	-1	16
7 AaB	11	4	-	2	-	5	17	14	3	14
8 Esbjerg	10	4	-	1	-	5	21	18	3	13
9 Silkeborg	11	4	-	1	-	6	21	21	0	13
10 Herfølge	11	4	-	1	-	6	13	23	-10	13
11 FC Nordsj.	11	3	-	3	-	5	13	18	-5	12
12 Randers FC	10	2	-	1	-	7	9	23	-14	7

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Frem	11	6	-	3	-	2	20	8	12	21
2 Sønderjyske E	11	6	-	2	-	3	26	13	13	20
3 AC Horsens	10	6	-	2	-	2	20	10	10	20
4 HIK	11	6	-	2	-	3	21	15	6	20
5 Skjold	11	6	-	2	-	3	19	17	2	20
6 Fremad Amager	10	5	-	3	-	2	20	10	10	18
7 Fredericia	11	5	-	3	-	3	20	12	8	18
8 Vejle	11	6	-	0	-	5	29	27	2	18
9 Køge	11	4	-	5	-	2	27	17	10	17
10 AB	11	5	-	2	-	4	20	18	2	17
11 NFA	11	3	-	3	-	5	24	25	-1	12
12 B 93	11	2	-	4	-	5	17	27	-10	10
13 Brønshøj	11	2	-	3	-	6	16	25	-9	9
14 Næstved	11	2	-	2	-	7	10	22	-12	8
15 Dalum	10	2	-	0	-	8	14	35	-21	6
16 Ølstykke	11	1	-	2	-	8	10	34	-24	5

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen (Frem), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

Danska 2. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Brabrand	11	8	-	2	-	1	31	13	18	26
2 Kolding FC	11	7	-	0	-	4	24	15	9	21
3 Slagelse	11	6	-	3	-	2	23	14	9	21
4 Glostrup	11	6	-	2	-	3	26	20	6	20
5 Jetsmark	11	6	-	2	-	3	26	21	5	20
6 Holbæk	11	6	-	1	-	4	19	14	5	19
7 Næsby	11	5	-	2	-	4	15	14	1	17
8 Lyngby	11	5	-	1	-	5	21	16	5	16
9 Roskilde	11	5	-	0	-	6	12	19	-7	15
10 Aarhus Fremad	11	4	-	2	-	5	20	17	3	14
11 B 1909	11	4	-	2	-	5	11	15	-4	14
12 Hjørring	11	3	-	4	-	4	13	16	-3	13
13 B 1913	11	3	-	3	-	5	16	18	-2	12
14 Holstebro	11	3	-	2	-	6	14	18	-4	11
15 Kalundborg	11	2	-	2	-	7	18	27	-9	8
16 Værløse	11	1	-	0	-	10	8	40	-32	3

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)